## Umvælingar av bátum



KREA.FO · TEL 44 93 39

Einasta góðkenda glasfiburbátasmiðjan í Føroyum.

Alt glasfiburarbeiði verður gjørt í góðkendum verkstaði.

Alt umvælingararbeiði á einum staði: leingjan av bátum, søla og íseting av motorum, - og so hava vit teir sera væl umtóktu slengrikjølarnar.

*Ring ella kom inn á gólvið.*

*Ein góð tænasta!*

**AWI BOATS SERVICE SP/F**
Rókahavnin 10 · FO-620 Runavík
Tel 448585 · Fartel 218585 · Fax 448785
awi@post.olivant.fo · awi.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

## Til sølu

Kubota motorbøra (Gummibeltir) KC 50 LZ, lessar 700 kg, arbeiðsvekt 400 kg, breidd 88 cm.

Góð at koyra har sum ringt er at sleppa til. Arbeiðir sera væl.

Er keypt sum nýggj í mai í ár. Til sølu um nóg gott boð fæst.

**Tlf. 210425**

## Kia carnival til sølu



· Árg. Apr. 2000 · Turbo intercooler
· 2.9 TD · Km. 102.000 · Automatisk gear

Til sølu um hóskandi boð fæst

**TEL 220 326 og 374 731**

Sosialurin 341800


## Tvingsilssøla

Fríggjadagin, 1. oktober, kl. 9.15 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 118, Nólsoy (AS nr. 2-17/2004).

Sambært tryggingarskjalinum er talan um eini sethús og er bygda økið 43 kvm.

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:

Miðhæddin: Durur, køkur, stova, sovirúm og eitt wc/brúsu.

Loftið: 1 sovirúm og eitt 1/2 uppihaldsrúm yvir køkinum.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 45205.01), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 13. september 2004*

## Tvingsilssøla

Fríggjadagin, 1. oktober, kl. 9.15 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 331, Toftir (AS nr. 2-16/2004).

Sambært tryggingarskjalinum er talan um eini sethús og er bygda økið 158 kvm.

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:

Miðhæddin: inngongd, lítið wc, gongd og annars køkur, vaskirúm, stova og útfrá stovuni ein altan, 4 kømur, wc/bað. Tilbygningur í tveimum hæddum.

Loft í tilbygningi: (ca. 2 m høgt skráveggir) innrættað til eitt rúm og annars 2 koyggjur í hvørjumegin undir væðingini. Restin ovastaloft.

Kjallarahæddin: Krúpikjallari.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 45205.01), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingssilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 13. september 2004*


Pronoun
Umseting til danskt og enskt

- Heimasíður
- Faldarar
- Avtalur
- Brúksávísingar
- v.m.

**Vit klára málið**

Pronoun
Tórgarðsgøta 19 · 100 Tórshavn
Tel 320215 · kjj@kallnet.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin


## Klinikkassistentur

Søkt verður eftir klinikkassistenti at byrja beinanvegin, ella eftir nærri avtalu. Starvið er ásett til hálva tíð.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Tannlæknastovuna í Brekkugøtu 8, 100 Tórshavn.

Nærri fæst at vita við at ringja.

**Tannlæknastovan í Brekkugøtu**
v/ Marnar Gaard
Ísak Thomassen
Regin Eikhólm
Tannlæknar
Tlf. 315158 · Fax 318716

INPACT
INTERNATIONAL

## Stjóri

Søkt verður eftir stjóra til P/F Fiskamarknað Føroya.

P/F Fiskamarknaður Føroya, sum hevur høvuðsskrivstovu á Toftum, hevur eitt fjølbroytt virksemi. Umframt at selja fisk á gólvuppsølu og á telefonuppboðssølu, rekur felagið landingarmiðstøð á Toftum og í Klaksvík. Harafturat eigur felagið í P/F Landingarmiðstøðini á Tvøroyri.

Arbeitt verður við broytingum í virkseminum hjá felagnum, sum stjórin skal luttaka í, og tillaga bygnaðin í felagnum eftir.

Á virkinum starvaðust tilsamans 76 fólk í 2003. Starvsfólkatalið hongur neyvt saman við virkseminum.

**Uppgávurnar** hjá stjóranum eru í høvuðsheitum hesar:
- at fyriskipa og hava eftirlit við virksemi felagsins
- at hava eftirlit við bókhaldi, roknskapi og fíggjarstýringini
- at menna og samskipa teldukervið og innanhýsismannagongdir í fyritøkuni
- at gera tíðarskeiðsroknskapir og ársroknskapir og samanhalda hesar við fíggjarætlanir

**Førleikakrøv**
Tann, ið verður settur, skal hava:
- Hóskandi ástøðiliga útbúgving frá eitt nú handils- ella handilsháskúla.
- Leiðsluroyndir frá almennum ella privatum virksemi.
- Lætt við at samvinna við fólk.
- Evni at samskifta bæði í talu og skrift.

Tann, ið verður settur í starvið, kann vænta sær eitt spennandi, mennandi og áhugavert starv, har bæði eigarar, starvsfólk og onnur fara at vísa áhuga og seta krøv.

Lønarviðurskiftini verða avtalað við nevndina.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

Meira fæst at vita um starvið við at tosa við Ólav Jøkladal ella við Jógvan Amonsson.

Tey, ið ætla at søkja, skulu senda skrivliga umsókn við prógvum og møguligum ummælum í seinasta lagi 1. oktober 2004 til:

**P/F Grannskoðaravirkið INPACT**
statsaut. revisorar
Postrúm 191
110 Tórshavn

Stílað: Jógvani Amonsson
ella
t-postur: inpact@inpact.fo


Sosialurin
www.sosialurin.fo



# ítróttur

Nr. 176 • hósdagur • 16. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Formaðurin skilir dómararnar



*Formaðurin í Hondbóltssambandinum sigur, at dómarastøðan uttan iva verður eitt av málunum, sum verður tikið upp á komandi fundinum við feløgini*

**Eivind Jacobsen, HSF-formaður, sigur, at málið viðvíkjandi manglandi dómarum verður tikið í størsta álvara**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fríggjadagin í farnu viku skrivaðu vit á hesum síðum um støðuna í dómarafelagnum, nú tað stóð greitt, at bert trý dómarapør høvdu teknað seg til dómaraskeið, sum skuldi haldast um vikuskiftið. Eitt skeið, sum samstundis verður sett sum krav til teir dómarar, sum ætla at døma fyrstudeildarhondbólt komandi kappingarár.

Væntandi undirtøkan hevði tá við sær, at skeiðið varð avlýst, men samstundis verður so ein seinasta roynd gjørd, soleiðis at skeiðið kann haldast beint undan kappingarbyrjan í hondbóltinum.

Eivind Jacobsen, formaður í HSF, sigur, at hann enn ikki hevur sæð skrivið, sum bert er sent feløgunum, men at hann sum so væl skilur støðuna hjá Dómarafelagnum.

– Eg má fyrst og fremst siga, at eg skilji væl trupulleikan. Og samstundis kann eg leggja dent á, at talan ikki er um nakrar trupulleika, sum er serstakur fyri Føroyar. Sjálvur var eg til týsku steypafinaluna í vár, og tá kom eg av tilvild at búgva á sama hotelli, sum dómarapørini. Har standa teir eisini við sama trupulleika, uttan at nøkur endalig loysn er funnin.

– Tí tað er væl eisini soleiðis, at tað at vera hondbóltsdómari, oftani kann tykjast sum eitt slag av urias-posti. Í løtum eri eg næstan av teirri fatan, at feløg vilja hava dómarar til sínar dystir, so tey hava onkran at skelda eftir dystin, og tað kann so ikki vera rætt. Og tað kann heldur ikki vera rætt, tá summi feløg so nærum nokta fyri at spæla, um ávís pør skulu døma teirra dystir. Dómararnir eru neyðugir, um hondbóltskappingin skal spælast, og so er ikki so nógv meira at tosa um tað, heldur formaðurin.

## Nógv arbeiði er eftir

Tá komið verður inn á verandi trupulleikan, er Eivind Jacobsen skjótur at svara, at hann so avgjørt ikki hevur nakra patentloysn upp á trupulleikan.

– Men Hondbóltssambandið fer annað vikuskiftið at hava fund við feløgini um ymisk viðurskifti. Upprunaliga var ætlanin einamest at tosa um leikarasáttmálar og –bindingar, men sum støðan er, so taki eg tað fyri givið, at dómaraspurningurin eisini verður ein partur av skránni.

– Tí onkursvegna, so eru tað framvegis fleiri lutir, sum mangla á dómarasíðuni. Partvíst er tað so, at vit bara hava nøkur fá pør, sum sýna áhuga fyri døming, men tað má so eisini vera ein uppgáva at økja um hendan áhuga. Samstundis mugu vit so eisini vera opin fyri, at tað sum so ikki tænir nøkrum endamáli, um talið bara verður økt, tí góðskan skal helst eisini fylgja við, og her eru júst slík skeið, sum tey hjá Dómarafelagnum, alneyðug.

– Tað kann so eisini vera, at trupulleikin í hesum førinum er tann, at ætlaða skeiðið var sett á skránna ov langt undan kappingarbyrjan, tí vanligt er jú, at fótbólturin fer avstað við tí nógva hesa tíðina, men tað veit eg so heldur ikki við vissu. Nú verður so ein nýggj roynd gjørd við nýggjum skeiði, og tað er so í øllum førum mín vón, at vit fram til tað hava funnið eina loysn í øllum hesum, sigur Eivind Jacobsen, sum annars tykist bera ótta fyri avleiðingunum, um vit missa bestu dómarapørini, soleiðis sum hóttanir hava ljóðað um.

– Tað eru jú altíð nógvar meiningar um dómarar, men hasi trý pørini, sum vórðu nevnd, eru allar helst tey bestu, sum vit eiga, og gevast teir, so vil tað vera eitt øgiligt bakkast fyri hondbóltin.

– Samstundis vil eg eisini leggja dent á, at fyri okkum í HSF hevur tað verið ein sera stór hjálp, at dómarafelagið er sett á stovn. Bæði tí teir loysa nógvar praktiskar uppgávur í avgreiðsluni av kappingarárinum, men eisini tí dómararnir tá hava sítt egna organ, sum kann viðgera ymsar støður, uttan at nevndin í HSF hvørja ferð skal blandast uppí. Enn hevur felagið so bara eitt ár á baki, men tað vildi verið tungt, um vit skuldu vent aftur til gomlu støðuna, sigur altso HSF-formaðurin, Eivind Jacobsen, at enda.